Bilasølan v. Øssur Johannesen:

# Øssur og Schumann eiga nú Bilasøluna

**Týsdagin 12. apríl keypti Schumann Hjaltalin helminigin í Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík. Øssur Johannesen, sum hevur átt og rikið fyritøkuna síðan 1994, er væl nøgdur við at hann og Schumann nú kunnu reka fyritøkuna saman**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Øssur Johannesen (v.m.) bjóðar Schumann Hjaltalin vælkomnan í fyritøkuna*

Bilasølan v. Øssur Johannesen hevur verið fyri stórum broytingum seinasta árið. Í fjør fekk Bilasølan umboð fyri Mazda bilarnar afturat bilmerkjunum Audi, VW og Seat, sum fyritøkan umboðar, og nú hevur handilsmaðurin og fyrrverandi býráðslimurin í Havn, Schumann Hjaltalin, keypt helmingin av fyritøkuni í Hoyvík.

Schumann er útbúgvin bilmekanikari og hevur arbeitt í nógv ár sum sølumaður innan bilvinnugreinina. Seinnu árini hevur hann verið annar av eigarunum av Handilskjarnanum í miðbýnum i Havn, sum aðrir nú hava keypt. Schumann hevur í longri tíð havt eitt ynski um aftur at sleppa at virka í bilavinnuni.

Øssur og Schumann siga, at stórar avbjóðingar eru fyri framman, og kappingin er hørð á bilmarknaðinum, men teir hava góð kort á hondum, fyritøkan er í vøkstri, teir hava góð bilmerkir, har fleiri nýggj bilmodell eru á veg, umframt at nýggjur framsýningarbygningur verður bygdur í summar.

Øssur Johannesen, sum hevur átt og rikið fyritøkuna síðan 1994, er sera væl nøgdur við at hann og Schumann nú kunnu reka Bilasøluna saman, og roknar hann við einum spennandi samstarvi.

## Húsavørður til Elektron

Vit søkja eftir nýggjum húsavørði, at avloysa okkara núverandi húsavørð, sum fer frá vegna aldur.

At vera húsavørður í Elektron er ein fjølbroytt uppgáva, sum bæði krevur góð evni sum handverkari, tøkniligt hegni og góð samstarvsevni.

**FØRLEIKAR:**
- Góðkendur el-innleggjari
- Maskinmeistari

**HÚSAVØRÐURIN HEVUR M.A. ÁBYRGDINA AV:**
- Øllum vanligum uppgávum sum húsavørður
- Neyðstreymsveitingini og el-skipanini
- Fráboðanarskipanum
- Sløkkiútgerðini
- Viðlíkahaldi av bilum
- Tryggingarviðurskiftum
- Viðlíkahaldi av VVS skipanum

Vit kunnu bjóða eitt gott arbeiðspláss við góðum starvsfeløgum. Løn sambært avtalu.

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Ullu Joensen, telefon 34 51 00 ella á telduposti ulla@elektron.fo.

Send eina umsókn við persónligum upplýsingum, útbúgvingum og starvsroyndum til P/F Elektron, Staravegur 9, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 20. apríl 2005. Stíla umsóknina til Ullu Joensen.

**UM ELEKTRON**
Elektron er KT-veitari til føroyska marknaðin. Størstu kundarnir hjá Elektron eru føroysku peningastovnarnir og Toll- og Skattastova Føroya. Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á Elektron starvast umleið 60 fólk og nettoumsetningurin var umleið 50 mió.kr. í 2004.

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 3219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 34 51 00 - FAX: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

Elektron

Stephanssons Hús